# Oljuprísir í topp

**Prísurin á olju og bensini hevur ikki verið eins høgur og nú í fleiri ár. Við teimum fráboðaðu hækkingunum kostar ein litur av vanligum bensini frá 8. august 8,09 krónur.**

LEIF LAADAL

Príshækkingin ið kemur í gildi 8. august, hevur við sær, at blýfrítt bensin nú fer at kosta 7,96 krónur, og brennioljan kostar nú 1,74 krónur. Hækkingin stendst av tí høga dollarakursinum.

Niels Juel Nattestad, stjóri hjá Statoil í Føroyum, sigur, at oljuprísurin fylgir við dollarakursinum og útboðnum á ráolju. Doll-arin er í topp, og útboðið av bensini á altjóða marknaðinum er ikki so stórt.

### Hitin enn dýrari

Eini vanliga stór sethús brúka umleið 4000 litrar av olju árliga. Við teimum báðum seinastu hækkingunum kostar húsarhitin 520 krónur meira árliga. Hetta kann sýnast nógv, men Niels Juel Nattestad sigur, at kjansurin fyri, at oljuprísirnir hækka enn meira, ikki er stórur. Dollarin sleppur ikki at spasera ótarnaður enn longur upp. Øll væntaðu, at Týskland fór at hækka rentuna í vikuni, men hesum bíða teir við fyribils. Hækkar Týskland rentuna, fer kursurin á dollaranum at lækka.

Sum nú er, er búskapurin í USA sera góður. Hetta hevur við sær, at USA dregur fremmandan valuta til sín. Fyri at gera sín marknað líka væl líddan sum tann amerikanska, so mugu hini ídnaðarlondini hækka rentuna. Tá ið hetta hendir, minkar prísurin á olju og bensini.

### Príslegan í Føroyum

Í mun til tey lond, ið vit vanliga sammeta okkum við, so er príslegan í Føroyum nakað tann sama. Bæði Danmark og Noreg hava havt líknandi hækkingar, og Niels Juel Nattestad sigur, at hvørki Danmark ella Noreg hava nakran beinleiðis fyrimun av at vera oljuframleiðarar.

– Oljan verður pumpað upp úr undirgrundini og seld á altjóða marknaðinum. Síðani keypa framleiðaralondini oljuna aftur, sigur stjórin.

Prísmunurin í teimum ymsu londunum stendst av, at oljuavgjøldini eru ymisk. Í Føroyum er avgjaldið 2.50 krónur fyri ein litur av bensini og hesum avgjaldi ræður tað staka landið sjálvandi yvir.

Prísurin í Føroyum er eitt sindur hægri enn í Danmark og Noreg, men hetta skyldast meirkostnað í flutningi.




**Niels Juel Nattestad, stjóri hjá Statoil, heldur ikki, at prísirnir á bensini og olju fara at hækka enn meira í bræði**

Mynd: Dia Midjord



**Claus Reistrup, Landsskúlafyrusitingin**

# Lærarar á oljuskúlabonk

**Fimm lærarar fara í næstum til Noregs, har teir skulu taka »grundskeið í boring« á Stavanger Maritime Skole.
– Um ikki so langa tíð kunnu vit í Føroyum geva frálæru í hesum skeiði, sigur Claus Reistrup frá Landsskúlafyrisitingini.**

DIA MIDJORD

Oljuvinnan er av álvara farin at gera um seg í okkara samfelag. Kortini er týdningarmikið, um vit ikki skulu vera tikin á bóli, at vit hava føroyingar við útbúgving innan hesa vinnuna.

Komandi leygardag fara fimm lærarar - ein frá Sjómansskúlanum, ein frá Maskinskúlanum, ein frá Tekniska skúlanum í Havn og tveir frá Tekniska skúlanum í Klaksvík - til Noregs á skúlabonk. Teir skulu taka »grundskeið í boring« á sjey vikur og haraftrat eitt trygdarskeið. Umframt skulu teir vitja á einum oljupalli hjá Statoil, ið skipar fyri hesum túrinum.

Svein Halle, rektari á Stavanger Maritime Skole, kemur hendavegin nú mánadagin. Hann fer at kunna um grundskeiðið í boring og greiða frá innihaldinum.

– Vit miðja ímóti, at vit sum fráliður fáa undirvísingarførleika í ymsum innan oljuvinnuna við okkara egnu lærarum, sigur Claus Reistrup á Landsskúlafyrisitingini.

Tað er Atlantic Margin Group, ið fíggjar túrin hjá teimum fimm lærarunum, og Saga Petroleum stendur fyri og fíggjar trygdarskeiðið.



**Samstarvið millum føroyskar og norskar skúlar, ið varð fingið í lag fyrr í ár, er nú farið so smátt at bera ávøkstur. Svein Halle, rektarin á Stavanger Maritime Skole, ið kemur til Føroya mánadagin, sæst í miðjuni**

# Føroyskir internet-brúkarar ikki longur niður at venda

**Tað er ein eyðsæddur fyrimunur fyri føroysku internet-brúkararnir, at øll skipanin nú er flutt heim til Føroya. Frammanundan hevur verið neyðugt at farið niður til Danmarkar at venda, men hesum slepst undan í framtíðini.**

HILMAR JAN HANSEN

Eitt sindur er fráliðið, síðani føroyingar gjøgnum telefonverkið kundu fáa gleði av tí altjóða samskiftismøguleika, internetið er. Men til fyri stuttum vóru servararnir niðri hjá Tele Danmark.

Nú er so langt um leingi øll skipanin flutt heim til Føroya, so tað skal vera lættari hjá brúkarunum í allar mátar. Eitt nú hevur í fleiri førum verið neyðugt at farið niður at vent, tá kósin hevur verið sett út á internetið.

– Við at hava allar servararnar í Føroyum, kunnu vit bjóða brúkarunum eina skjótari svartíð. Frammanundan hevur tað eitt nú verið so, at teldupostur millum tveir føroyskar brúkarar er farin niður til Danmarkar at venda, áðrenn hann er komin vegin fram, og somuleiðis er loyniorðið blivið eftirkannað í Danmark, hvørja ferð ein brúkari hevur loggað seg inn á netið, sigur Jógvan Martin Grástein, leiðari á Internetdeildini hjá telefonverkinum.

– Nú skuldi so alt blivið lættari, skjótari og betri. Meðan vit hava arbeitt við at flyta alla hesa skipanina heim til Føroya, hevur eitt nú teldupostskipanin verið nakað órógvað, men hetta arbeiði er nú liðugt.

### Fleiri broytingar

Av tí sama, at øll skipanin er flutt heim, kemur internet-brúkarin at merkja ávísar broytingar. Eitt nú skal ringjast 0076 í staðin fyri 0075 fyri at fáa samband við internetið, og tað er serliga í hesum sambandi, at Internetdeildin hjá telefonverkinum nú í lýsingum vendir sær til brúkararnar.

– Vit hava verið noyddir at stovnað allar brúkararnar av nýggjum, tí ikki ber til at flyta brúkararnar beinleiðis. Av tí sama kenna vit bert brúkaraorðini hjá kundum okkara, meðan vit ikki kenna loyniorðini, sigur Jógvan Martin Grástein.

– Hetta hevur so við sær, at enn kann ringjast á 0075 við gamla loyniorðinum, meðan ikki ber til at sleppa ígjøgnum á 0076, uttan so at vit hava fingið at vitað loyniorðið og hava givið brúkarunum eitt nýtt í staðin. Og tá allir servararnir um ein mánað bert eru til taks á 0076, mugu vit fáa fatur á brúkarunum.

Og so framkomið sum internetið og samskiftið har enn kann vera, heitir telefonverkið á fólk um heilt einfalt at taka telefonina og ringja »upp á gamla máta« til Internetdeildina og boða frá loyniorðinum.

– Hóast alt er tað snildasti og lættasti mátin at fáa loyst henda trupulleika, um brúkararnir á tann hátt seta seg í samband við okkum. Tá so ein tíð er fráliðin, fara vit inn at kanna, hvørji hava givið okkum loyniorðið og ikki, og so mugu vit bert senda hinum brævi, sum ikki hava boðað okkum frá, sigur Jógvan Martin Grástein, leiðari á Internetdeildini hjá telefonverkinum.

Tá alt hetta er komið upp á pláss, kunnu tilsamans 64 føroyskir internet-brúkarar vera á netinum í senn, meðan talið í løtuni bert er 48 – harav 32 á nýggja nummarinum 0076, meðan 16 enn eru á gamla nummarinum 0075, sum altso bert kann brúkast í ein mánað aftrat.



**Jógvan Martin Grástein, leiðari av internetdeildini hjá Telefonverkinum**

# Fiskidagarnir skulu avgreiðast í dag

**Tað er eitt undantak, men kortini ein neyðugur og týdningarmikil fundur, sum verður settur í morgun í Løgtinginum. Tá skulu nevniliga tvey mál til 3. og endaligu viðgerð.**

SNORRI BREND

Annað málið hevur við sjógvin at gera, og hitt við jarðarbrúk at gera, ávikavíst uppskotini um vinnuligan fiskiskap og um nýggjan grunn fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu.

Neyðugt varð við hesum fundinum í dag, tí tingmenn vildu ikki geva undantak frá tíðarfreistini. Og tá málið um vinnuliga fiskiskapin skal avgreiðast nú, var ikki annað at gera hjá tingformanninum enn at at boðsenda tinginum til fundin, sum byrjar kl. 10 í morgun.

### Spennandi orðaskifti

Tað er knýttur ein ávísur spenningur til málið um vinnuligan fiskiskap, tí menn eru rættiliga ymiskir á máli um, hvat rættast er at gera.

Vinnunevndin, sum hevur havt málið til umrøðu, eftir at tað hevði verið til 1. viðgerð, býtti seg í ein meiriluta og ikki minni enn tríggjar minnilutar, sum komu við sínum viðmerkingum í álitinum.

Tá málið so var til 2. viðgerð fyrr í vikuni kom enn eitt sjónarmið fram, nevniliga frá tingmanninum Jákup Joensen. Sjálvur kom hann við egnum broytingaruppskoti til ætlaðu løgtingslógina.

Hansara uppskot gekk m.a. út uppá, at møguleikin at umseta fiskidagarnar verður óbroyttur í fimm ár, og at skipanin við innaru og ytri fiskidagaleiðini verður avtikin. Haraftrat mælti hann til at ein friðing av gýtingarleiðunum hjá toski, hýsu og upsa í gýtingartíðini verður tikin við í lógina, eins og hinar økisfriðingarnar.

Innan samgonguna eru eisini rættiliga ymiskar meiningar. So seint sum í Sosialinum í gjár verður eykamaðurin, Pauli Ellefsen endurgivin fyri at taka soleiðis til orða um viðgerðina av málinum: »Tit hava gjørt eitt stak vánaligt arbeiði. Hetta er størsta juks, eg havi verið úti fyri«.

Lagt er tí upp til eitt spennandi orðaskifti í dag, har eisini málið um at seta ein grunn at stuðla vakstrarhúsum og grønmetisframleiðslu – rabarbugrunnurin, sum onkur kallar hann – skal avgerast.

Triðja og seinasta málið á skránni í dag er framløga.

